STARVSLÝSING




## Reingerðarfólk

Søkt verður eftir tveimum fólkum at vaska okkara høli á Debesartrøð og á Falkavegi í Tórshavn.

Annað vaskifólkið verður at meta sum ábyrgdarhavandi vaskifólk. Í umsóknini skal upplýsast, hvat av størvunum søkt verður um.

**Arbeiðsuppgávurnar**
Hølini skulu gerast rein eftir galdandi vaskiskráum. Hølini á Debesartrøð eru kanningarstovur, skrivstovur, kantina o.a., sum hoyrir einum slíkum bygningi til, meðan hølini á Falkavegi fyri tað mesta eru skrivstovur.

Vaskast skal dagliga í hølunum á Debesartrøð og 3 ferðir um vikuna í hølunum á Falkavegi.

Íroknað vaskiarbeiðið er bílegging av útgerð, sum verður nýtt til vaskingina.

**Krøv til útbúgving og førleika**
Royndir frá líknandi arbeiðsuppgávum eru ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

Partur av vaskiarbeiðinum er fysiskt krevjandi.

Vit vænta, at tú dugir vanligu edv forritini, sosum word og outlook. Hetta tí at teldan verður eitt náttúrligt arbeiðsamboð í sambandi við bílegging av vaskiútgerð og annað.

Vit sóknast eftir vaskifólki við áræði, framfýsni og dirvi at náa settum málum.

Tá ið tiltøk eru av stovnsligum slag, vænta vit, at tú hevur møguleika at luttaka.

**Tíð og setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt, og løn verður útgoldin útfrá nýttari arbeiðstíð sambært elektroniskari stempliskipan.

Fyri hvørt vaskifólk er arbeiðstíðin normerað til 2,9 tímar um dagin, ella 14,5 tímar um vikuna. Teir dagar, tá ið vaskað verður bæði á Debesartrøð og Falkavegi, er flutningur millum bæði støðini á 10 minuttir íroknað arbeiðstíðina.

Vaskingin fer fram eftir kl. 18 á kvøldi.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið, sí www.lnd.fo. Lønin liggur um 7.500 kr. um mánaðin.

Umsóknir við avriti av møguligum viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. september 2007.

Bæði størvini verða at seta sum skjótast.

Lýsingin er eisini at síggja á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo, har tú eisini kanst kunna teg um vaskiskráirnar.

*Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, tel. 35 64 00.*

FOOD VETERINARY and ENVIRONMENTAL AGENCY

VAST1 459010

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 356 400
Fax +298 356 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

---

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## Leiðari til Heimatænastuna í øki 2, Sundalagið/Eiði

Í tráð við visjónirnar hjá Heimatænastuni um at samskipa allar tænastur innan eldraøkið, søkja vit eftir einum leiðara til Røktarheimið á Mørkini, Streymnes, ið eisini fevnir um heimatænstuna úti í Sundalagnum/Eiði at byrja skjótast gjørligt.

Ert tú ein ígongdsetari, torir at ganga nýggjar leiðir, er fleksibul og opin fyri nýggjum avbjóðingum, er tað tær vit hava brúk fyri.

Talan er um eitt nýtt og spennandi starv við nýggjum avbjóðingum innan eldrarøkið, har tú fært møguleikan at vera við til at uppbyggja og samansjóða allar tænastur, ið Heimatænastan hevur at bjóða í Sundalagnum/Eiði.

**I dag fevnir Heimatænastan í økinum um:**
- 32 búpláss og umlættingarpláss á røktarheiminum á Mørkini
- 15 búpláss og umlættingarpláss á eldrasambýlinum Korndalsbýlið
- Heimasjúkrarøkt
- Heimahjálp
- Mattænastu
- Økisterapi
- Dagtilboð til heimabúgvandi pensjónistar

Uppgáva tín verður, saman við starvsfólkunum at skipa eina samansjóðaða tænastu, har vit við umsorgan stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum, har arbeitt verður eftir hugtakinum "The Eden Alternative".

**Vit vænta av tær, at tú:**
- Hevur útbúgving og autorisatión sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Hevur hollar royndir innan eldraøkið
- Hug og hegna at fyrisita og leiða
- Hevur evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Fyrimunur er, um tú hevur eftirútbúgving innan leiðslu

**Sum leiðari hevur tú ábyrgdina av:**
- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdina av veittum tænastum.
- At stuðla og menna starvsfólkið
- At búfólkaeindirnar virka í samsvar við hugtakið "The Eden Alternative"
- At virkað verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvið
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

Starvið er skipað við tilvísing til Økisleiðaran í heimatænastuni í øki 2

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Setunarstaðið er Nærverkið við tænastu í løtuni í Heimatænastuni í øki 2. Løn- og setanarviðurskifti er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara á tlf. 333249.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

**Nærverkið / Heimatænastan**
Att: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
FO 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist :** 10. september 2007.

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

---

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

TELEFON 22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA